# Ómarkaði kyn í føroyskum

## Unmarked or default genders in Faroese

*Hjalmar P. Petersen*
á Merkrunum 5, FO-360 Sandavági, Føroyar;
Email: hjalpet@post.olivant.fo

### Úrtak

Í hesum greinarpetti verður víst á, at føroyskt hevur tvey ómarkaði kyn, kallkyn og hvørkikyn. Málið liggur tískil mitt ímillum íslendskt og hini norðurlendsku málini, og tað tykist vera soleiðis, at hvørkikyn vinnur á kallkyni.

### Abstracts

We will show in this article that Faroese has two unmarked or default genders, masculine and neuter. The language is situated between Mainland-Scandinavian and Insular-Scandinavian, just as is the case with the phonological system, the morphological system, syntax and vocabulary, and it seems to be the case that a change is happening from having masculine as default gender to neuter.

### Inngangur

Kyn sæst ikki í sjálvum navnorðinum, men, sum Hockett sigur, 'Genders are classes of nouns reflected in the behaviour of associated words' (1958:231), sbr. setningarnar í (1) niðanfyri:

(1) a. ein stórur maður
b. ein stór brúður
c. eitt stórt tjaldur

Tað er kortini ikki altíð, at vit hava eitt navnorð, sum krevur kynsbending, t.d. er navnháttur ikki ein eyðkendur kynskontrollørur. Hetta verður viðgjørt undir *Kyn uttan ein eyðkendan kontrollør*.

Tá ið talan er um kyn í føroyskum, hevur orðaskiftið verið, um føroyskt ger kynsmismun, m.a. tí vit hava orð eins og *mannagongd* ella at *maður* verður brúkt í merkingini 'menniskja', o.s.fr. (Didriksen, 1986).

Henda spurning fari eg ikki at viðgera her, men fari at spyrja, hvat kyn er ómarkað, tí tað er vanliga soleiðis, at mál velja eitt kyn sum tað ómarkaða, ja, kunnu eisini hava eina blandskipan (Corbett, 1999), og eg fari at vísa her, at føroyskt hevur í løtuni eina blandskipan.

Greinin er bygd upp soleiðis, at eg fyrst komi inn á, hvat tað vil siga, at ein eind í málinum er ómarkað (en. *unmarked* el. *default*); síðani verður hugt at ómarkaðum kallkyni, at muninum ímillum *onkur, nakar* mótsett *øll*, at hvørkikyni sum ómarkaðum kyni, at førum, har vit hava kyn, uttan ein eyðkendan kontrollør, og verður so tikið samanum síðst í greinini.

### Ómarkaðar og markaðar eindir

At ein málslig eind er ómarkað vil siga, at

Fróðskaparrit 52. bók 2004: 22-28

hetta er tað, sum altíð er. At okkurt er eitthvørt av sær sjálvum. Vit kunnu lýsa tað við einum dømi úr ljóðskipanini.

Í føroyskum hava vit eitt l- ljóð í *land*, eitt annað í *alt*, eitt triðja í *telgja* og eitt fjórða í *kjálki*, umframt at vit hava eitt fimta í *árla*.

Tað fyrsta ljóðið er eitt tann-tannrygsljóð, sum er raddað. Hetta er tað vanligasta virðið, sum *l*-fonemið hevur. Tað er tað ómarkaða virðið hjá foneminum. Øll hini ljóðini koma fyri í serstøkum, avleiddum støðum, her framman fyri eitt óraddað, aspirerað ljóð (*alt*), eitt harðgómaljóð (*telgja*), eitt aspirerað harðgómaljóð (*kjálki*) og aftan fyri eitt retroflekst ljóð (*árla*).

Vit siga, at /l/ altíð er [l], t.e. eitt raddað, lateralt tann-tannrygsljóð, og at tað er hetta virðið, ljóðið hevur í teirri mentalu grammatikkini. Tá ið tað so kemur at standa í vissum umhvørvum, og tað ávirkast frá kringumstandandi ljóðum, broytist virðið á *l*-ljóðinum. Í fyrra føri er talan um tað ómarkaða ljóðið /l/, í hinum førunum um markaðar variantar av hesum ljóðum.

Tá ið tosað verður um ómarkað kyn, meinast við, at øll orð hava hetta kynið upprunaliga, men at mann so kann seta reglur upp fyri, nær tey fáa annað kyn. Eg meti tá, at tað ber til at seta upp reglur fyri kynstillutanini í føroyskum, t.e., at hon ikki er tilvildarlig. Arbeitt verður við hesum evni í løtuni.

Eg havi lagt dent á at hyggja at grammatiskum konstruktiónum, tá ið eg her havi kannað ómarkað kyn, men til ber at taka annað við, sosum at spyrja, um eitt av teimum trimum kynunum í føroyskum hevur fleiri orð enn hini. Kynsbýtið ímillum kall-, kvenn- og hvørkikyn er, sbr. Zakariasen (1994) sum í mynd 1. Talan er tá um øll orð í orðabókini.

*Mynd*

| Kallkyn | Kvennkyn | Hvørkikyn |
|---|---|---|
| 24% | 21% | 21% |

(Zakariassen, P. 1994:93).

Arbeitt verður í løtuni við evninum, og er tískil ein datagrunnur gjørdur. Hann byggir á øll ósamansett navnorð í Føroysk orðabók, og har havi eg funnið hetta kynsbýtið:

*Mynd*

| Kallkyn | Kvennkyn | Hvørkikyn |
|---|---|---|
| 3368 | 2937 | 2895 |

Út frá hesum tølunum ber ikki til at siga nakað um, hvat kyn er ómarkað í føroyskum, tí tað er so lítil munur á.

Ein annar máti at gera av, hvørji el. hvat kyn er ómarkað, er at hyggja at lániorðum. Fara tey bara inn í eitt kyn, ella fara tey í øll trý kynini? Uttan at hava kannað hetta nærri, tori eg at siga, at heldur ikki her ber til at siga nakað um marking, tí lániorðini verða antin kall-, kvenn- ella hvørkikyn.

Barnamál er áhugavert, tí her síggja vit, hvussu tær málsligu reglurnar spakuliga verða uppbygdar, og hvat er fyrst. Eg arbeiði í løtuni við hesum, og tað, sum eg higartil eri komin fram til er, at tað sær út til, at hvørkikyn er ómarkað:

(2) a. Eg kalt
Eg eri kaldur (Pætur, 2 ár)
b. Bilin brotið

Bilurin er brotin (Jan, 2 ár)
c. Bilin bangið
Bilurin er bangin (Jan, 2 ár)
d. Mánin brotið
Mánin er brotin (Jan, 2 ár, t.e. hann er hálvur)

### Ómarkað kallkyn

Spurningurin er nú, um vit í føroyskum brúka kallkyn, tá ið vit vísa til tað almenna yvirhøvur.

Okkurt kundi bent á, at so er, tí ikki er óvanligt, at konufólk nýta kallkyn *seg sjálvan* og ikki kvennkyn *seg sjálva*, sum dømini niðanfyri vísa. Tey eru øll frá 2004 og tað eru konufólk, sum tosa. Í (3a) hava vit kallkynsformin, meðan vit í (3b) bæði hava kvennkyn og kallkyn.

(3) a. eg ætli mær at trena **meg sjálvan** í sangskriving
b. ...og so krevur tú nokk so nógv av **tær sjálvari**... ... drívur **teg sjálvan**...

Í fleiri orðafellum er tað kallkynsformurin, sum vísir til tað almenna – altso er tað ómarkaða kynið. Tað sæst í dømunum í (4), har tað eisini er vert at leggja til merkis, at *eingin* kann vera bæði kall- og kvennkyn, sbr. *eingin maður/kona var á ballinum...*

(4) a. Eingin veit á morgni at siga, hvar **hann** á kvøldi gistir
b. **Hann**, ið árla rísur, verður um mangt vísur[1]
c. Tað vildi **hann/tann** Dávur sagt
d. Eingin kvøður betur, enn **hann** kann (Petersen og Isholm, 2003)

Verður hugt at einum ópersónligum fornavni eins og *nakar*, hevur tað kvennkynsformin *nøkur*, men spyrja vit, um nakar er inni, verður kallkynsformurin *nakar* brúktur, ikki kvennkynsformurin *nøkur*.

(5) a. Er **nakar** inni?
b. Sást tú **nakran**, sum tú kendi í gjárkvøldið í dansinum?

Sama við eitt nú *onkur*. Í hvønn- og hvørjumfalli verður skilt ímillum kynini í føroyskum: *onkran, onkrum* í kallkyni, *onkra, onkrari* í kvennkyni, og eisini her verður kallkynsformurin vanliga brúktur:

(6) Sást tú **onkran**, sum tú kendi í dansinum í gjárkvøldið?

og við spurnaðarfornøvnum verður eisini kallkynsformurin vanliga brúktur, t.e. *hvønn* og ikki *hvørja*.

(7) **Hvønn** tosaði tú við í dansinum í gjárkvøldið

Eg havi eisini dømir, har konufólk brúka kallkynssnið av einum lýsingarorði, tá ið tey tosa um tað almenna, sum í (8), har ein kvinna nýtir *noyddur* og *móður*, sjálvt um tað væl hevði borið henni til at sagt *noydd* og *móð*. Lurtar tú, hoyrir tú fleiri slík dømir. Legg merki til, at *tú* og *mann* her hava somu merking.

(8) Tú hevur 3 børn at taka tær av og tú ert **noyddur** at hanga í, sjálvt um mann er **móður** (Cassiopeia, SvF, 25/04-04).

og millum dømini hjá Didriksen (1986:48 ff) er hetta:

(9) Hvis tú er ***normalur*** og ert ***gravid***, so fært tú hasar kensl-urnar

Øll hesi dømini meira enn benda á, at vit í føroyskum nýta kallkyn sum tað ómarkaða kynið, og hetta er tann sama støðan, sum til er í íslendskum, har tey hava til dømis *allir* í einum setningi sum (10):

(10) Allir géta ekki komið í sund í dag

Júst *allir* verður ikki eins nógv nýtt í føroyskum sum í íslendskum. Vit hava her hvørkikynsformin *øll*, og bendir tað á ein mun ímillum málini[2], sbr. (11) niðanfyri.

## Onkur, nakar mótsett øll

Vit síggja í (10) (og eisini í (11) í næsta petti, at munur er ímillum íslendskt og føroyskt, og at hvørkikyn er tað sterkara, ómarkaða kynið í føroyskum. Tó verður kallkyn nýtt í *nakar, onkur* og spurningum sum *hvør/hvønn*.

Í teimum førum, har vit hava *øll* er talan um ein universellan kvantor (en. *quantifier*), sum bindur variabulin, t.e. $\forall x$. Tá ið talan er um *nakar* og *onkur*, hava vit ein eksistentiellan kvantor $\exists x$.

Her er munur á kynsvali, umframt at *nakar, onkur...* krevja, at tað, sum víst verður til hevur dragið [+menniskja], og tí ber ikki til at spyrja: *Sást tú nakað/okkurt*, um sipað verður til menniskju. Í *øll* ber hetta til.

Verður hugt at spurnaðarfornavninum, geldur tað sama her, sum fyri *onkur, nakar,* og eisini setningar við *tú/mann* sum í (8), *tú ert noyddur*, sum ikki velur nakran ávísan út í diskursinum, júst sum *onkur, nakar, øll*, og tað er hetta mynstrið, sum sær út til at vera ráðandi í dømunum omanfyri.

## Ómarkað hvørkikyn

Hvørkikyn verður eisini brúkt sum ómarkað kyn í føroyskum, sbr. dømið niðanfyri:

(11) a. **Tey brekaðu** hava ikki nógvar pengar
b. **Faltaðir** hafa ekki mikið...
(Thráinsson *et al.*, 2004:225(3))

Í (11a) í føroyskum nýta vit hvørkikyn fleirtal, meðan (11b) vísir, at íslendingar nýta kallkyn.

Tann danski málfrøðingurin Otto Jespersen hevði eitt, hann kallaði *conceptional neuter*, sum hann greinar sum:

'the real or notional or universal neuter in opposition to the specified or concrete neuter which we have when in English we refer to a previously mentioned house or worm, etc. as *it*...'

(Jespersen, 1924:241).

Hetta verður í bókini um kyn hjá Corbett nevnt 'neutral agreement' (Corbett, 1999).

Talan er um, at vit í vissum førum hava hvørkikyn.

Um nú fyrst verður hugt at veðursagnorðum sæst, at tað ber til í norrønum at hava sagnorðið einsamalt, uttan nakað grundorð ella nakran grundlið:

(12) a. dagar
b. myrkvar
e. haustar
f. rignir

(Hansen *et al.*, 1975).

Sagnorð, sum siga frá náttúruumstøðum, broytingum í degnum og ljósinum og árstíðum kunnu í íslendskum hava antin grundliðin *það* 'tað' ella *hann* ella ongan grundlið (Einarsson, 1949). Dømir úr íslendskum eru:

(13) a. **það** dagar
b. **það** dimmir
c. **það** vorar, haustar, vetrar
d. **það** rignir, suddar, snjóar, hríðar, fýkur, hlánar

Men her ber eisini til at nýta *hann*:

(14) a. **hann** rignir, snjóar...

ella einki grundorð, sum í:

(15) a. **nú** snjóar

(Einarsson, 1949)

Hetta eru alt dømi um *conceptional neuter* hjá Jespersen, og verður hugt at føroyskum, sæst, at tað eisini ber til at hava *hann* her, sum dømini niðanfyri vísa:

(16) a. **hann** regnar
b. **hann** kavar
e. **hann** lýnaði veðrið

(Føroysk Orðabók, 1997)

og vit kenna øll vendingar sum:

(17) a. **hann** er høgur í ættini
b. **hann** veksur vindin
e. Man **hann** fara at halda sær?

Ikki er løgið, at vit hava *hann* ella *tað* í slíkum dømum í føroyskum, har eitt grundorð ella ein grundliður so at siga er kravdur (Thráinsson *et al.*, 2004), men tað, sum meira hevur okkara áhuga, er, at tað sær út til, at *tað* er vanligari í hesum førum enn *hann*, sum í:

(18) a. **tað** regnar
b. **tað** kavar

Eg fekk 19 næmingar á Handilsskúlanum á Kambsdali at svara einum spurnablaði. Miðalaldurin er umleið 19 ár, og úrslitið varð:

Mynd

Tað sæst í Mynd 3, at ung fólk í dag heldur velja *tað* enn *hann*, sjálvt um tað í summum førum var soleiðis, at tey settu kross við báðar møguleikarnar. Tey samanløgdu tølini tala tó fyri seg, at ein broyting tykist henda frá at brúka *hann* til at brúka *tað*.

| | | | |
|---|---|---|---|
| hann regnar | 0 | tað regnar | 19 |
| hann lýsir í | 0 | tað lýsir í | 19 |
| hann dimmir | 1 | tað dimmir | 18 |
| hann kavar | 3 | tað kavar | 17 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| hann er høgur í ættini | 13 | tað er høgætt | 8 |
| hann veksur vindin | 14 | vindurin veksur | 5 |
| man hann fara at halda sær | 6 | mann veðrið fara at halda sær | 13 |
| hann várar | 0 | tað várar | 19 |
| hann myrknar | 0 | tað myrknar | 19 |
| **Til samans** | **37** | | **137** |

Rákið er greitt. Ungdómurin velur heldur *tað* enn *hann*, har talan er um broytingar í árstíðunum *hann várar* > *tað várar* og broytingar í lýsi, *hann dimmir* > *tað dimmir*, meðan tað enn ber til at hava *hann*, tá ið talan er um veðrið, sum *hann er høgur í ættini*.

Hetta tulki eg á tann hátt, at vit í føroyskum hava bæði kallkyn og hvørkikyn sum ómarkaði kyn, og at ein broyting er í ferð við at henda yvir til at nýta hvørkikyn. Eitt gott dømi um tað er í (19), har vit fyrst síggja kallkynsformin *sjálvir*, síðani hvørkikynsformarnar *noydd* og *sjálvi:*

(19) Hesa gongd, at vit mugu **sjálvir** bæði gjalda meira og fáa meira vald í okkara egna samfelag... Vit verða **noydd** at hava eitt vinnulív... Vit mugu **sjálvi** framleiða vørur, sum í dag verða innfluttar

(Didriksen, 1986)

Fornøvnini *allir* og *summur* benda á tað sama. Í íslendskum brúka tey yvirhøvur kallkynsformin *allir*, meðan føroyingar antin brúka *allir* ella tað vanligara *øll*, sum í (20), har ein kann hugsa sær, at lærarin kemur inn í skúlastovuna og spyr (20a), og kent er eisini dømið í (20b) frá *Aktuella horninum* hjá J. Haraldsen:

(20) a. Eru *øll* komin?
b. Høvdu summi vita, hvat summi siga um summi, so høvdu summi ikki verið so góð við summi, sum summi eru við summi!

Eitt annað, sum greitt vísir ein mun ímillum íslendskt og føroyskt er, tá ið talt verður. Vit siga *eitt, tvey, trý*... hvørkikyn altso, íslendingar brúka kallkyn.

**Kyn uttan ein eyðkendan kontrollør**

Eitt lýsingarorð skal t.d. hava kyn í føroyskum, har talan er um eitt navnorð, sum er ein eyðkendur kontrollørur, sum setningarnir í (1), t.e.: *ein stórur maður, ein stór brúður, eitt stórt tjaldur*, men tað er ikki altíð, at vit hava ein eyðkendan kynskontrollør.

Verður hugt at døminum í (21), sæst, at vit ikki hava nakran eyðkendan kynskontrollør. Í (21a) er talan um navnhátt sum grundlið, saman við (21b), t.e.: tað at vinna á Eysturríki, kláraðu vit. Áhugaverd eru eisini dømini í (21f) og (21h). Vit siga ikki: 'Fiti, **hon** er ein trupulleiki', heldur verður *tað* brúkt.

(21) a. at fáa tað besta burtur úr **tí** er neyðugt
b. vit kláraðu **tað**. At vinna móti Eysturríki
e. **tað** góða
f. **tað** ónda
g. Maðurin og barnið vóru **ill**

h. Fiti, **tað** er ein trupulleiki
i. Fótbóltur, **tað** stimbrar
j. Royking, **tað** brýtur niður

Tað tykist eisini sum summi heimildarfólk halda, at (22a) ikki eydnast eins væl og (22b):

(22) a. *Royking, **hon** brýtur niður
b. Fótbóltur, **hann** stimbrar

## Samanumtøka

Ein kann siga, at føroyskt er í ferð við at broytast soleiðis, at hvørkikyn verður brúkt alt meira sum ómarkað kyn. At vit nú meira hava hvørkikyn sum ómarkað kyn kann vera ávirkan frá fastlandsskandinaviskum, um tað ikki er ávirkan frá teimum førum, har vit hava ein óvanligan kynskontrollør.

## Tilvísingar

Corbett, G. 1999. *Gender*. Cambridge University Press. New York.
Didriksen, K. 1986. *Færøerne, sprog og køn*. Husets Forlag, Århus.
Einarsson, S. 1949. *Icelandic Grammar*. Grammar, Texts, Glossary. The John Hopkins Press. Baltimore.
Hansen, E., Mundal, E. og Skadberg, K. 1975. *Norrøn Grammatikk*. Universitetsforlaget. Oslo.
Hockett. C.F. 1958. *A Course in Modern Linguistics*. Macmillan. New York.
Jespersen, O. 1924. *The Pholosophy of Grammar*. The University of Chicago Press. Chicago and London.
Petersen, H.P. og Isholm, P. 2003. *Steinur brestur fyri mannatungu*. Brattalíð. Norðragøtu.
Thráinsson, H., Petersen, H.P, Jacobsen, J. í L. og Hansen, Z.S. 2004. *Faroese. An overview and Reference Grammar*. Føroya Fróðskaparfelag. Tórshavn.
Zachariassen, P. 1994. Eg dvøljist við tøl. Sýnisstubbar. *Málting*. Sprotin.

1) Í (4b) og (4c) kann talan vera um eina ljóðrætta útvikling av *þ* til *h*.
2) Áðrenn eg fari frá kallkyninum, skal eg nevna eitt dømi, har kynsmunurin er neutraliseraður og eisini talið:

**Tær** kenna seg **óvissan**

Her brúkti útvarpsmaðurin, tí dømið er úr Útvarpi Føroya, *tær*, altso kvennkyn í fleirtali, men kallkyn í eintali *óvissan*.